# ítróttur

Nr. 92 • leygardagur • 15. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

GÍ-B36:

# Oddadystur í Gøtu

**Mest áhugaverdi dysturin í 1. deild hetta vikuskifti er óivað dysturin í Gøtu millum oddaliðið GÍ og næstfremsta liðið B36.**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bæði liðini vóru heldur óvæntað sligin út, tá ið fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið vóru leiktar seinasta vikuskifti, og tí eru tað tvey lið, ið skulu reisast, ið fara á vøllin í Gøtu sunnudagin.

### Profilar aftur á liðnum hjá B36

Gøtumenn hava allar sínar mans klárar til dystin sunnudagin, og teir ætla at leggja nógv fyri, so at teir framvegis hava fult stigtal, tá ið triðja leikumfar er farið aftur um bak. Súni Olsen, landsliðsleikari í GÍ, sigur, at gøtumenn hava koyrt dystin móti NSÍ seinasta leygardag í gloymibókina, og nú verður bara hugt frameftir.

Hjá havnarliðnum eru góð tíðindi at frætta. Tríggir av mest markantu profilunum í hópinum eru farnir undir venjingina aftur, eftir at hava verið skaddir. Talan er um landsliðsleikaran Johannus Joensen, og teir báðar fyrrverandi landsliðsleikararnar, Jens Kristian Hansen og Allan Mørkøre. Hetta eru óivað góð tíðindi fyri B36-venjaran, Jóannes Jakobsen, sum tó má verða teir báðar, Niels Joensen og Klæmint Matras, fyriuttan, tí teir eru skaddir. Tað er eisini ivasamt, hvørjir av teimum trimum oman fyri nenvdu profilunum hjá B36 verða við í hópinum til dystin í Gøtu sunnudagin.

Dystirnir millum GÍ og B36 í Gøtu eru tiltiknir undirhaldandi dystir við nógvum málum og kontantum nærdystum, og uttan iva verða tað ein stór áskoðarafjøld til dystin.



*Spennandi verður, um John Petersen og co. fara at vinna á GÍ í Gøtu sunnudagin*

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 16.05 | KÍ-EB/S | Georg Rasmussen |
| 16.05 | Skála-ÍF | Páll Augustinussen |
| 16.05 | HB-VB | Birgir Sondum |
| 16.05 | GÍ-B36 | Dagfinn Olsen |
| 16.05 | NSÍ-B68 | Petur Skarðenni |

**2. deild menn**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 15.05 | TB-KÍ | Hans F. Hansen |
| 15.05 | Sumba-B36 | Jens P. Brattalíð |
| 15.05 | FSV-B71 | Palli Gregersen |
| 15.05 | LÍF-VB | Dan Højgaard |
| 15.05 | AB-Royn | Petur H. Joensen |

**3. deild menn**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 16.05 | SÍ-EB/S | Emil Hentze |
| 16.05 | NSÍ-B68 | Jóannes Mikkelsen |
| 16.05 | HB-TB | Andrew Christiansen |
| 16.05 | Skála-ÍF | Johnleif Gerðisá |
| 16.05 | GÍ-Fram | Jan Gardar |

**1. deild kvinnur**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 16.05 | FSV-B36 | Kristian av Kák |
| 16.05 | AB-GÍ/B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 16.05 | KÍ-Sumba | Jón K. Frederiksen |

# Tølini tala

| | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | 94 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-EB/S | 4-1 | 3-1 | 0-4 | - | - | - | - | - | - | 8-2 | 2-0-2 | 15-8 |
| Skála-ÍF | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| HB-VB | 0-0 | 3-0 | 2-1 | 2-2 | 2-0 | 5-1 | 1-2 | 1-2 | 2-0 | - | 5-2-2 | 18-8 |
| GÍ-B36 | 1-4 | 2-2 | 3-1 | 1-0 | 2-1 | 5-2 | 0-2 | 3-0 | 2-0 | 2-0 | 7-1-2 | 21-12 |
| NSÍ-B68 | 1-1 | 1-2 | 1-1 | 3-0 | 4-1 | 4-1 | 2-1 | - | 0-5 | 0-0 | 4-3-2 | 16-12 |

Bæði í Havn og í Gøtu hava heimaliðini, HB og GÍ, havt tak á, tá ávíkavist VB og B36 vitja. Hinvegin hevur tað verið meira javnt í Runavík, tá grannauppgerð er við toftamenn, og í Klaksvík hevur EB/ Streymur onkra tíð argað, tó at tað KÍ samanlagt er væl omaná.

Nú eru tað so ikki hagtølini, sum avgera nakran dyst, men stuttlig kunnu tey kortini vera, og á talvuni sæst, hvussu tað hevur gingist seinastu tíggju árini, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í bestu mansdeildini.

-jm



KÍ-EB/S:

# KÍ ætlar sær trý stig

**Klaksvíkingar fáa vitjan av EB-Streymi sunnudagin, og í KÍ ætla teir sær øll trý stigini, so at góða byrjanin upp á landskappingina kann halda fram**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í Klaksvík eru teir nøgdir við tey fýra stigini, ið teir hava tryggjað sær aftaná tey bæði fyrstu leikumførini í landskappingini. Ósigurin í fjórðingsfinaluni í Løgmanssteypinum móti fuglfirðingum seinasta leygardag er farið í gloymibókina, og nú verður bara hugsað um landskappingina.



*KÍ skal reisa seg eftir tapið á ÍF*

### Tvey ivamál hjá KÍ

Hjálparvenjarin hjá KÍ, Jákup Mikkelsen, sigur, at tað sær rímuligt út við fólkinum til dystin sunnudagin, men tó eru nøkur ivamál. Polski veteranurin Marek Wierbicki er ivasamur, tí hann hevur fingið ein lítlan skaða í lærið, og tað verður neyvan avgjørt fyrr enn sunnudagin, um hann er førur fyri at leika. Hinvegin er danin, Jacob Bymar, sum hevur verið uttan fyri við skaða, farin undir venjingina aftur, men tað er tó ivasamt, um hann verður við í hópinum sunnudagin. Jákup Mikkelsen sigur, at KÍ nú hevur tveir heimadystir á rað, og fáa teir fulla úrtøku burtur úr teimum, sær tað bara heilt gott út.

### Ivi um liðskiparan hjá sundalagsmonnum

EB-Streymur fingu ein ordans umgang, tá ið teir vóru í Havn leygardagin og leiktu fjórðingsfinalu móti HB. Í 1-7 ósigrinum var sjónligt, at pólverjin, Andrej Pacek, manglaði í verjuni hjá EB-Streymi, men hann verður við aftur, nú leikbannið hjá honum er av. Tað er tó ivasamt, um liðskiparin hjá sundalagsmonnum, Jákup Martin Joensen, verður við, tí hann hevur ikki vant alla vikuna, tí hann hevur fingið ein skaða at dragast við.

HB-VB:

# Vágbingar aftur til Havnar

**HB skal fyri fyrstu ferð í ár royna seg á heimavølli, tá ið VB fyri triðju ferð í ár kemur í Gundadal**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í HB er eingin ivi um, at alt annað enn trý stig er ikki nøktandi. Føroyameistararnir hava bert fingið eitt stig av seks møguligum í teimum báðum fyrstu leikumførunum í landskappingini, og tá ið mótstøðuliðini hava verið Skála og EB-Streymur, eru teir í havnarfelagnum alt annað enn nøgdir. Hinvegin hava vágbingar havt fitt av vindi í seglunum seinastu tíðina, og tá ið teir vóru í Gundadali fyri viku síðani, bastu teir B36.



*Spennandi verður, um vágbingar megna at endurtaka bragdið frá seinasta vikuskifti*

### Liðskiparin ivasamur

Einasta ivamálið hjá HB undan dystinum sunnudagin er, um liðskiparin Rúni Nolsøe verður klárur til at taka dystin upp við sínar bygdarmenn. Rúni var ikki við í fjórðingsfinaluni seinasta vikuskifti, og sum skilst verður hann testaður stutt undan dystinum sunnudagin, so at greiða kann fáast á, um hann er førur fyri at spæla. Hvørki Hans á Lag ella Bárður Johannesen eru tøkir enn, men væntandi fer Hans undir aftur venjingina um eina viku, meðan tað verður væl drúgvari hjá Bárði.

### Milan við aftur

Vágbingar hava alt fólkið tøkt, ið var við til at basa gullfavorittunum úr B36 seinasta vikuskifti. Onkrir leikarar fingu smávegis snuddir undir tí dystinum, men allir eru tó klárir aftur sunnudagin. Harafturat er stýrimaðurin á miðvøllinum hjá VB, Milan Kuljic, við aftur, eftir at hann hevði leikbann ímóti B36 í fjórðingsfinaluni um Løgmanssteypið. HB og VB hava hitst tvær ferðir áður í hesum kappingarárinum, tí liðini vóru í bólki saman í kappingini um Løgmanssteypið, og tá vunnu vágbingar 4-0 á heimavølli, meðan havnarmenninir vunnu 6-0, tá ið leikt var í Gundadali.

NSÍ-B68:

# Bæði liðini svang eftir stigum



*Tað verður helst runavíkingurin Mortan Hansen, sum fer at verja málið hjá B68*

**Í Runavík verður grannauppgerð sunnudagin, tá ið toftamenn kom inn til Runavíkar at dystast við NSÍ**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru tvey lið, ið eru rættuliga svong eftir stigum, sum fara á vøllin í Runavík sunnudagin í einari rættuligari grannauppgerð. Bæði NSÍ og B68 hava fingið eina vánaliga byrjan upp á kappingarárið, og tí er alneyðugt hjá báðum liðum at ogna sær stig. Dystirnir millum NSÍ og B68 plaga at verða rættuliga javnir og spennandi, og sunnudagin verður neyvan nakað undantak.

### B68 nýggjan málmann

Runavíkingar hava ongan leikara skaddan, og heldur ikki er nakað leikbann. Sigurin á GÍ í fjórðingsfinaluni seinasta vikuskifti hevur bøtt munandi um hýrin í hópinum, og tað er einki at ivast í, at NSÍ ætlar sær øll trý stigini móti toftamonnum. Ein av leikarunum hjá NSÍ, Helgi L. Petersen, sigur, at nú er tað eitt krav at fáa nøkur stig, tí alt annað er ikki gott nokk.

Á Toftum hava teir fingið eina enn verri byrjan upp á árið, enn hvat grannarnir í Runavík hava. B68 hava tapt báðir teir fyrstu dystirnar, og fyri at gera ilt verri, er sterki málverjin hjá B68, Albert Svævarsson, fara heim aftur til Íslands av persónligum orsøkum. Sum skilst á Toftum, bendir alt á, at tað verður Mortan Hansen, ið stendur millum stengurnar, tá ið dysturin í Runavík verður brúkslaður í gongd sunnudagin. Hinvegin kunnu toftamenn fegnast um, at teir ongan mans hava skaddar ella leikbannaðar í løtuni.